## Bøndur krevja týðing

Íslendsku bóndurnir eru misnøgdir við, at spurningarnir, sum ES hevur latið íslendsku stjórnini í sambandi við umsóknina um limaskap, eru orðaðir á enskum máli. Tí hevur samtakið hjá bóndafeløgunum sent uttanríkisráðnum í Reykjavík eina áheitan um, at teir spurningarnir, sum hava við landbúnaðarmál at gera, verða týddir til íslendskt. Sambært feløgunum er tað neyðugt, fyri at allir bóndurnir kunnu seta seg inn í innihaldið. Tá Olli Rehn, kommiserur, var í Reykjavík í síðstu viku, handaði hann stjórnini 2.500 spurningar, sum stjórnin nú skal svara ES.



## Færri lesa bløð

Ein kanning í Noregi vísir, at fleiri av teimum stóru bløðunum selja støðugt færri eintøk, meðan tey smærru bløðini standa seg væl betur í so máta. Eitt nú vísir kanningin, at Dagbladet, sum er eitt av teimum stóru, hevur mist 50.000 lesarar tað seinasta árið. Harafturímóti hava fleiri av teimum minnu bløðunum fleiri lesarar nú enn í fjør. Í kanningini sæst eisini, at støðugt fleiri norðmenn lesa bløðini á alnótini. Tann størsta lesaraskaran hevur VG við 1.504.000 vitjanum dagliga, sum er væl meiri enn tað næsta blaðið, sum er Dagbladet, ið hevur 985.000 vitjanir á alnótini um dagin.



# Vilja hava øl og vín í handlarnar

**Seinastu tvær vikurnar hevur Pulsurin, ein veljarakanning á Portalinum, spurt um tað skal vera loyvt at keypa øl og vín í handlunum. Greiður meiriluti talar fyri tí, skal ein trúgva kanningini**

ANALYSA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Skulu veljarakanningar á internetinum takast fyri fult, er tað ein stórur og greiður meiriluti í Føroya fólki, ið talar fyri eini liberalisering av rúsdrekkalógini í Føroyum.

Í veljarakanningini á Portalinum, kallað »Pulsurin«, hevur seinastu tvær vikurnar verið spurt, um tað skal vera loyvt at keypa øl og vín í handlunum.

Klokkan 11.50 í dag vóru 22.877 atkvøður skrásettar, og tá vísti lutfallið, at ein greiður meiriluti, 78 prosent, er fyri at liberalisera rúsdrekkalógina og loyva keypi av øl og víni í handlunum. Ein lítil minniluti, 21 prosent, hava svarað, at tey ikki halda at tað skal vera loyvt, meðan góð tvey prosent siga seg ikki vita.

Hetta kundi bent á, at tað er ein ávísur røringur millum fólk, har alsamt fleiri hella til, at tíðin er komin at liberalisera rúsdrekkalógina.

### Ikki eftirfarandi

Talan er tó »bert« um eina kanning á internetinum. Sambært Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingi, er ein slík kanning tó ikki eftirfarandi.

Trupulleikin er sambært honum, at einki kontroll er við at ein slík kanning er umboðandi fyri fólkið. Eitt nú kann tað hugsast, at systemið verður pumpað upp av fólki, ið hevur atgongd til fleiri ymiskar teldur, og øðrum, ið við snildum kunnu atkvøða ferð eftir ferð við somu teldu.

Hinvegin er tað eisini lítið hugsandi at tað eldra – og meira afturhaldna – ættarliðið ger tað sama.




### Áhugaverdur spurningur

Hóast henda veljarakanning ikki kann kallast umboðandi fyri fólkið í Føroyum, eru tølini áhugaverd.

Frá fyrsta degi kom lutfallið í atkvøðunum at liggja í somu legu, sum tað hevur gjørt mestsum alla tíðina. Tá talan er um internetkanningar, eru tað tó eisini í stóran mun yngru ættarliðini, ið hava atgongd til at atkvøða. Men eru tað jú ikki júst tey yngru ættarliðini, ið skulu búgva í landinum í framtíðini?

Harafturat skal havast í huga, at tað eru nógvir útisetar, ið lesa Portalin, og harvið gevur hetta eisini eitt ávíst útslag. Lutfallið av vitjanum innanlands liggur vanliga um 70 prosent av teimum gott 60.000 brúkarunum, ið vitja síðuna hvørja viku.

Hinvegin kunnu vit aftur spyrja, um tað ikki eru júst útisetarnar, vit royna at fáa at flyta aftur til Føroya?

Áhugavert hevði tí verið at tikið henda sama spurning við í eina komandi veljarakanning, har eftirlit var við um kanningin og umboðanin av fólkinum er eftirfarandi. Tá hevði spennandi verið at vita, um henda kanning vísti, at sama lutfall av fólkinum er fyri at liberalisera rúsdrekkalógina, ella lutfallið fall ein heilt annan veg.

Síðan hevði eisini verið áhugavert at kannað, um samsvar var millum Fólksins vilja og í hvussu hesi sjónarmiðini vóru umboðað á Tingi.

# Spyr um gegni hjá formanninum í Vinnuframagrunninum

**Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi spyr í morgin Johan Dahl, landsstýrismanni í vinnumálum, um gegni hjá nýggja formanninum í Vinnuframagrunninum**

FYRISPURNINGAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í morgin verða munnligir fyrispurningar á skránni í Løgtinginum. Tá fer Bjørt Samuelsen, tingkvinna fyri Tjóðveldi, millum annað at spyrja landsstýrismannin í Vinnumálum, Johan Dahl, um gegni hjá nýggja formanninum í Vinnuframagrunninum.

Í viðmerkingunum sigur hon millum annað, at »tað er ein sannroynd, at nýggi formaðurin í Vinnuframagrunninum, ið annars er kendur sum ein dugnaligur íverkseti, hevur tøtt sambond til Íverksetarahúsið í Klaksvík, har hann var nevndarlimur inntil hann tók við starvinum sum formaður í Vinnuframagrunninum. Hann hevur eisini politisk bond til nevndarforkvinnuna í Íverksetarahúsinum (Kitty May Ellefsen, blm.), ið er (fyrrverandi, blm.) forkvinna í Havnar Framburðsfelag. Somuleiðis er formaðurin skrivari hjá Fólkaflokkinum, og harvið politiskur sparrari hjá landsstýrismanninum í Uttanríkismálum, ið jú sum kunnugt tók avgerð um brádliga at niðurleggja Samvit.«

Hon spyr eisini til framtíðarætlanirnar við Kleking, ið er gjørt eftir sama leisti sum »inkubatorskipanir« í øðrum londum, har hugsanin er at hjálpa nýggjum vinnum, sum hava eitt altjóða potentiali í gongd.

Hon sigur tí víðari í viðmerkingumum, at »bæði Íverksetarahúsið og Kleking eru natúrligir umsøkjarar til pening úr Vinnuframagrunninum. Tá avgerðir verða tiknar um stuðul til ymiskar verkætlanir, og um framtíðina hjá Kleking. er tað sjálvandi av stórum týdningi at tað ikki kann setast spurnartekin við gegni hjá teimum, sum taka so týdningarmiklar avgerðir.«

Munnligu fyrispurningarnir verða svaraðir á tingfundinum í morgin, mikudagin 16. september.